

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 03 - 2012

# Foinaven framleiðir aftur olju

Fyrsta oljukeldan vestan fyri Hetland, sum fór undir framleiðslu í 1997, Foinaven og hvørs framleiðsla hevur verið steðgað í ein mánað, hevur nú aftur skrúvað frá oljukrananum. Ein lítil leki í einum parti av havbotnsútbúnaðinum hevði við sær, at BP so skjótt sum lekin varð uppdagaður gjørdi av at steðga allari framleiðsluni. Hetta bæði fyri at tryggja sær, at meira olja ikki lak út og fyri at kunna staðfesta, hvat veruliga var hent. Um sama mundið varð avgjørt at brúka høvi til at fara undir eitt heildareftirlit og umvælingar, har hetta varð neyðugt. Metingarnar vilja annars vera við, at lítið og einki av olju lak út í havið. Talan var um eina evarska lítla rivu í einum av framleiðslurørunum. Nú er arbeiðið liðugt, og oljan rennur aftur. Foinaven, sum varð funnið av BP í 1993, hevur framleitt olju í umleið 15 ár. Øll oljan verður viðgjørd og goymd umborð á einum flótandi oljuskipi, FPSO, á staðnum,haðani oljan so verður flutt víðari við smærri oljutangabátum (Shuttletankers) til oljuhavnina Flotta á Orknoyggjunum.